Himins lovsang

VERS 1
Mær leingist so at koma til tann staðin
Har náðin býr, og sorgin burtur er
At síggja Hann, sum leið, og sum meg frelsti
Og fylgjast tá í ævir Honum við

NIÐURLAG
Dagur koma skal
Øll níga fyri Honum
Dagur koma skal
Tá deyði er ei meir
Skoða andlit Hans
Sum doyði, men nú risin er
Heilur, heilagur ert Tú

VERS 2
Hvør ein bøn, í vónloysi varð biðin
Vit sungu sang
Í trúgv, tó ivin beit
Tá stríð er av, og Jesus kemur aftur
Tá alt er gott, hvørt tár Hann turka skal

VERS 3
Hin stóra dag í uppreisn verða saman
Lið um lið við trúarhetjunum
Eitt sameint kór av túsund ættarliðum
Syngur verdugt er Guds offraða lamb (x2)
Í ævir ræður Hann

NIÐURLAG 2
So komið øll í dag
Og syngið himins lovsang
Við heilagum og einglum
Rópa vit í kór:
Æra til vár Gud
Sum okkum lív gav handan grøv
Heilur, heilagur ert Tú